tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Tú liggur sum tú hevur reitt

## *Oddagrein*

Tað kom ein maður og gjørdi eina bygnaðarbroyting. Hann fekk góða løn, og so fór hann avstað aftur. Eftir standa 45.000 føroyingar við eini verkætlan, sum eingin vil kennast við, tí tey siga, at hon kann ikki brúkast. Men politikarar teirra hava góðtikið og sett verkætlanina í verk, hóast teir sjálvir siga hana vera ónýtiliga.

Søgan ljóðar rímiliga kend. Tað var einaferð ein danskur frásøgumaður, sum segði frá eini søgu um ein keisara, sum skuldi hava nýggjan búna. Og tá skræddararnir bert bóru seg at og tosaðu nóg fínt, fingu teir fólk at trúgva og góðtaka hvat sum helst. Og líkt er til, at søgan hevur lyndi at endurtaka seg.

Í okkara søgu er bara tann munur, at Føroya Landsstýri sjálvt hevur boðið skræddaranum at seyma búnan.

Tað bar til hjá einum føroyskum løgmanni, saman við einum donskum ráðgeva, at avhøvda alla føroysku fyrisitingina og seta okkurt í staðin, sum sambært føroyskum embætismonnum als ikki hóskar til føroysk viðurskifti.

Tað er stutt sagt ov vánaligt, at føroyskir politikarar í dag reka eina beinleiðis »heksajagstran« mótvegis danska ráðgevanum persónliga, tá tað í veruleikanum eru teir sjálvir, sum hava selt Føroya framtíð fyri egnan politiskan vinning.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, vísir í dag øllum spurningum frá sær við teirri grundgeving, at hann sat í andstøðu, tá fyrireikingarnar til bygnaðarbroytingarnar vórðu gjørdar. Men hann gloymir at svara uppá, hví hann ikki steðgaði verkætlanini, tá hann tók við sum fíggjarmálaráðharri tveir mánaðar fyri, at verkætlanin varð sett í verk av tí landsstýri, hann sjálvur sat í.

Og Jóannes Eidesgaard umber seg við, at har vóru ikki aðrir valmøguleikar, og at tað longu vóru brúktir so nógvir pengar, at teir vóru noyddir at taka tað, sum var.

Tað gjørdu politikararnir so, men loyva sær kortini seinni at finnast at ráðgevanum fyri hansara vánaliga arbeiði. Tað er ov vánaligt av politikarunum.

Eftir stendur so, at føroyski skattaborgarin hevur goldið einastaðni millum eina og hálvaaðru millión í løn til ein danskan ráðgeva, sum hevur latið eina vøru, sum serliga føroyskir politikarar elska at hata. Í dagligari talu verður tosað um Finn Norman Christensen verkætlanina, eins og tað var hann, sum einsamallur fullførdi hana.

Veruleikin er tó, at tað var Føroya Landsstýri, sum bað um og setti í gildi verkætlanina. Finn Norman Christensen hevur ikki avgjørt eitt einasta petti í øllum hesum leiki.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Eru allir føroyingar óvitar?



Suðuroyingar brúka orðið óviti — eitt gott føroyskt orð. Ein óviti merkir ein unglingi, sum ikki hevur sama vit, sum ein tilkomin, ein vaksin ella ein myndugur, persónur.

Ert tú ein óviti, ja so ert tú antin ein smágenta, ein smádrongur ella hálvvaksin. Men sum frálíður verður tú einaferð vaksin og eisini myndugur, og tá ert tú ikki longur nakar óviti.

**Alt vent á høvdið**
Men nú hevur Høgni Hoydal, sum hevur vavt føroyskan politikk upp í ein ellubita, vent øllum hesum á høvdið.

Hann hevur upp í saman, bæði í skrift og talu, lýst allar føroyingar sum verandi óvitar. Hann sigur, at vit gerast ikki myndug fyrr enn vit hava fingið fullveldi.

Okkara høga Løgting, okkara løggevandi vald, landsstýrið og øll tess umsiting, er sambært Høgna Hoydal mannað við ómyndugum fólkum - t. v. s. óvitum.

Við hesum sera løgna málburði hevur Høgni Hoydal ikki bara skírt allar sínar egnu landsmenn sum ómyndug fólk, nei hann hevur eisini lýst allar skotar, allar álendingar, allar týskarar og øll í USA sum óvitar, og ómyndug.

**Sakligt orðaskifti ella hurlivasi?**
Hví er tað so neyðugt at gera loysingina og alt fullveldismjarrið til ein stóran hurlivasa ? Er tað ikki júst Høgni Hoydal, sum ferð eftir ferð hevur biðið um eitt meira sakligt orðaskifti ?

1. Er tað so sakligt, at bólka sínar landsmenn upp í **ringar og góðar føroyingar?**

2. Er tað sakligt, at lýsa allar føroyingar sum búgvandi í einum húsi, har danir hava alt ræðið, men har føroyingar kunnu fáa loyvi til at búgva í kjallaranum og **kanska eisini sleppa at mála kamarið ?**

3. Er tað sakligt at brúka internetið — heimasíðuna hjá landsstýrinum til at **villleiða** føroyingar og allan heimin um tað positiva við loysing og fullveldi ?

4. Er tað sakligt at lýsa munin millum andstøðuna og samgonguna, sum hjálparloysi ella sjálvbjargni, serliga tá hugsað verður um at andstøðan hevur eitt nógv tryggari og betri uppskot um at menna okkara sjálvbjargni og fíggjarliga frælsi hjá tí einstaka føroyinginum?

5. Er tað sakligt ikki at svara skilagóða spurninginum um fólkatingslógir, sum Helgi Abrahamsen, floksskrivari Sambandsfloksins setti í bløðunum hósdagin 2. mars í ár?

6. Er tað sakligt, at samgongan kann brúka fleiri milliónir og alla sína umsiting til sína loysingarherferð, meðan andstøðan ikki fær somu fíggjarligu møguleikar fyri at verja seg?

7. Er tað sakligt, at samanbera komandi samráðingar við danir við ein dyst, har tann eini parturin vinnur og hin liggur eftirá ?
Tórshavn tann 10. 03. 2000

**Trygvi F. Guttesen**

# Undirvísa fýra tímar meira enn aðrir

Føroya Lærarafelag undrar seg stórliga tá Signar á Brúnni, landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, sigur, at lærarar skulu fáa **samsýning** fyri meiri álagt arbeiði.

Føroya Lærarafelag hevur ikki kravt **samsýning** fyri meira álagda arbeiðið. Vit hava heldur ikki kravt **løn** fyri hetta meiri álagda arbeiðið.

Føroya Lærarafelag krevur, at lærararnir í føroyska fólkaskúlanum skulu fáa **tíð** at gera tað arbeiðið, sum okkum er álagt í nýggju fólkaskúlalógini.

Føroya Lærarafelag undrar seg eisini stórliga á, at Signar á Brúnni, landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, sigur, at arbeitt verður við ymsum útrokningum í samband við arbeiðsósemjuna, samstundis, sum Tummas Magnussen úr Fíggjarmálastýrinum sigur, at teir als einki gera við málið.

Hvør meinar nú hvat?

Enn einaferð sæst, hvussu tvinni aðalstýri hjá Føroya Landsstýri ikki arbeiða saman.

Hvussu skal nakað spyrjast burtur úr samráðingum, tá slík viðurskifti valda?

Men **her** snýr tað seg ikki bara um lønarsamráðingar, men um ein nýggjan og góðan fólkaskúla, ið tæna skal Føroya Fólki.

Hetta kostar.

So, Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, skal ikki halda á at tvinna løn og meirkostna saman.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at føroyskir lærarar undirvísa færri tímar enn lærarar í Norðurlondum annars.

Hesum kann Føroya Lærarafelag afturvísa.

Føroyskir lærarar undirvísa umleið 4 klokkutímar meira enn bæði íslendskir og danskir lærarar, sigur Føroya Lærarafelag í tíðindaskrivi.

# Starvsfólkapolitikkur



Tveir nýggir partar av starvsfólkapolitikkinum eru nú settir í gildi. Partarnir eru um Arbeiðsumhvørvispolitikk og Bygnaðarbroytingar.

Parturin um Arbeiðsumhvørvispolitikk snýr seg um kringumstøðurnar á arbeiðsplássum, tað verið seg tær fysisku og tær sálarligu. Í arbeiðsumhvørvispolitikkinum verður eisini mint á at halda galdandi reglur og ásetingar á økinum.

Parturin um Bygnaðarbroytingar snýr seg um starvsfólkaluttøku í sambandi við avgerðandi broytingar á arbeiðsplássinum.

Tað er alt meira vanligt í Føroyum, og ikki minst í londunum rundan um okkum, at gera broytingar og tillagingar á arbeiðsplássunum.

Á fleiri arbeiðsplássum, kanska serliga á privata arbeiðsmarknaðinum, verður tað sett sum eitt av fremstu krøvum, at hava liðiligar arbeiðsumstøður og skjótt kunna tillaga viðurskiftini, til tess at náa sett mál.

Tað er eyðsæð, at kunning og luttøka frá starvsfólksins síðu, er avgerðandi fyri í hvønn mun leiðslur fáa góð úrslit, við teim broytingum og tillagingum, tær gera.

Í partinum um bygnaðarbroytingar verður víst á hesi viðurskifti.

Starvsfólkapolitikkbólkurin arbeiðir framhaldandi við at orða ymsu partarnir av starvsfólkapolitikkinum. Í løtuni verður arbeitt við rúsevnapolitikki, roykipolitikki, eldrapolitikki og familjupolitikki.

Harumframt, verður arbeitt við at gera leiðreglur fyri umsjón við starvsfólkapolitikkinum. Ætlanin er so líðandi at fara undir at fremja umsjón við starvsfólkapolitikkinum seinni í ár.

Starvsfólkapolitikkurin er sendur stovnum í fyrisitingini og yrkisfeløgunum. Allir partarnir, sum eru settir í gildi, liggja á heimasíðuni hjá landsstýrinum, á www.fl.fo

Ringbind við galdandi starvsfólkapolitikki fáast á Løgmansskrivstovuni, Nýskipanardeildini fyri 34,- kr, sigur Løgmansskrivstovan í tíðindaskrivi.



# Fegnast um blíðskapin

*Ferðafólk eru spurd um, hvat teimum dámar, og hvat teimum ikki dámar við at ferðast í Norðoyggjum*



*Ferðafólki dámar væl vøkru og grønu náttúruna, men ikki óruddið og regnið, staðfestir kanningin um ferðavinnuna í Norðoyggjum…*

EYÐUN KLAKSTEIN

Ferðafólki í Norðoyggjum dámar náttúrna, grøna litin og vinarliga fólki. Men teimum dámar ikki órudd, vantandi kunning um tiltøk og regnið.

Hetta kemur fram í kanningini, sum Olga Biskopstø, cand. comm., hevur gjørt av ferðavinnuni í Norðoyggjum.

Hon hevur spurt ferðafólk, hvat teimum dámdu við at ferðast í Norðoyggjum, og hvat tey ikki dámdu.

Ferðafólkini eru væl nøgd við náttúruna, smáu oyggjarnar, blíðskapin, hjálpsemi og fuglalívið. Tey, sum eru spurd, nevna eisini friðin, útsýnið, havið og reinu luftina.

**Sakna upplýsing**
Men ferðafólkini eru ikki nøgd við øll viðurskifti, og nakað av tí, sum tey finnast at, er samstundis tað, sum kanningin mælir til verður betrað framyvir.

Nógv finnast at, at kunning og upplýsing eru ikki nøktandi. Ferðafólkini sakna fleiri skelti, sum vísa til áhugaverd støð, tey vilja hava fleiri og betri upplýsingar um, hvørji tiltøk eru at fara til, og onkur heldur, at tað regnar ov illa...

Ferðasambandið í vikuskiftinum fær eitt skot fyri bógvin, og somuleiðis halda ferðafólk, at tað er ov kostnaðarmikið at ferðast.

Summi sakna atgongd til internetið. Og onkur heldur eisini, at ov nógv órudd er uttan um húsini, og havt verður eisini at munni, at ov nógv fólk lata bilarnar verða í gongd, tá tey fara til handils.

Svarini hjá ferðafólkunum eru partur av umfatandi kanning av ferðavinnuni í Norðoyggjum, sum Olga Biskopstø hevur gjørt.

# Sjúkrasystrar stovna áhugabólk

Í samband við at 1999 varð skírt eldraár, tóku røktar- og ellisheimsleiðarar og demensbólkurin hjá sjúkrasystrafelagnum stig til at stovna fakligan áhugabólk fyri sjúkrasystrar, sum starvast við geriatriska og gerontologiskar sjúkrarøkt og sum hava áhuga fyri hesi sergrein.

Endamáli áhugabólksins er:

- at menna heilsu- og sjúkrarøkt innan hesa sergrein
- at stuðla hvørjum øðrum og menna fakliga førleikan
- at fremja samstarvið millum fakligar áhugabólkar
- at fremua samanhald millum limirnar í áhugabólkinum

Á stovnandi aðalfundinum vóru hesi vald í nevndina fyri FÁG 4: Marjun Smith, forkvinna, Óluva Johannesen, næstforkvinna, Helena Poulsen, skrivari, Sigrun Arnoldsen, kassameistari og Cecilia Vestureið, nevndarlimur. Eykalimir eru Sunneva Petersen og Maj Dahl.

# Tveir lambskotnir almennir stovnar

*Politiskt hevur verandi skipan verið trupul at umsita og hevur mangan givið bæði landsstýrismonnum og løgtingsmonnum grá hár í høvdið, sigur Edmund Joensen m. a. í viðmerkingunum til uppskot um teir báðar stovnarnar LV og SL*

ÓLAVUR Í BEITI

– Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið lógaruppskot um bygnaðarbroytingar og privatiseringar/útlisiteringar á Landsverkfrøðingsstovninum og Strandfaraskipum Landsins, soleiðis at undir Vinnumálastýrinum verður skipað deild, sum skal taka sær av øllum virkseminum, sum nú er hjá Landsverkfrøðingsstovninum og hjá Strandfaraskipum Landsins, og so nógv sum gjørligt av tí virkseminum, sum nú hoyrir undir hesar stovnar, verður privatiserað og útlisiterað til privat at røkja, og at uppgávurnar hjá nýggju deildini skulu í høvuðsheitum vera ráðgeving, útbjóðingar og at vera eftirlitsstovnur fyri Føroya Landsstýri, er uppskotið hjá Edmundi Joensen, sum hann hevur lagt fram vegna Sambandsflokkin.

**Stovnarnir endurskoðast**
Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur Edmund Joensen, at nú annað árið á rað hava Landsverkfrøðingsstovnurin og Strandfaraskip Landsins virkað sum tveir lambskotnir almennir stovnar. Støðan hevur sostatt verið bæði ótrygg og ótolandi.

– Politiska viðgerðin av undirsjóvartunlinum og akutta støðan á Strandfaraskipum Landsins, nú talan er um at leggja skipini, vísir, at tíðin er komin, har hesir stovnar eiga at verða endurskoðaðir. Flestu munnu ásanna, at skipanin hevur fingið loyvi at vaksa á ein hátt, sum ikki gevur borgarunum bestu og bíligastu tænastuna.

– Tí verður skotið upp, at landsstýrismaðurin í vinnumálum setir eina skjóttarbeiðandi nevnd at koma við einum fullfíggjaðum uppskoti um, hvussu hetta best kann gerast, so endamálið við eini privatiseringar-/útlisiteringarætlan av nevndu stovnum kann verða rokkið. Tænastan, sum kemur at avloysa ta verandi, skal hava sum mál at útvega borgarunum eina betri og ódýrari tænastu, sigur Edmund Joensen m.a. í viðmerkingunum til uppskotið.

# Misbrúkti báðar døtur sínar

*Ein 51 ára gamal maður var í Føroya Rætti mánadagin dømur í tvey ára fongsul fyri kynsliga at hava misbrúkt tvær døtur sínar øll barnaárini*

EIRIKUR LINDENSKOV

Tvey ára fongsul. Tey vóru boðini, ein 51 ára gamal maður fekk í Føroya Rætti mánadagin, tá dómur fall í einum máli, har ein maður varð skuldsettur fyri kynsligan ágang móti tveimum døtrum sínum.

Maðurin varð varðhaldsfongslaður 11. februar í ár, og á rættarfundinum fyri afturlatnum hurðum mánadagin tók hann við dóminum, sum um framt fongsulsrevsingina eisini álegði manninum at gjalda døtrunum 30.000 krónur í part.

Tann 51 ára gamli maðurin var dømdur fyri blóðskemd, fyri samlegu við eldru dóttrina, tá hon var 18 ára gomul og fyri annað kynsligt samband enn samlegu við yngru dóttrina fyrstu ferð tá hon var sjey ára gomul og síðstu ferð tá hon var 15 ára gomul.

Maðurin varð kortini frídømdur fyri annað kynsligt samband við eldru dóttrina, tí hesar ákærur fullu fyri firningarfreistini. Eitt ár var millum tveir teir seinastu tilburðirnar, maðurin var ákærdur fyri, go tí helt rætturin ikki, at talan var um eina samlaða tilburðargongd.

Ákæruvaldið vildi annars hava harðari revsing, men av tí at so long tíð var liðin fráliðin, síðani seinastu tilburðirnar, sum vóru ávikavist á sumri í 1990 og á sumri í 1991, gjørdist revsingin linari.

# Út at koyra fríggjadag

Teigurin »út at koyra«, sum hevur verið í Sosialinum hvønn hósdag, verður framyvir í blaðnum fríggjadag. Í hesum teigi verður nýggir bilar lýstir, trivið verður í føroysku bilastøguna, eins og ferðsla og ferðslutrygd annars verður viðgjørd, eins og tað sum rørist í bilastarvsgreinini bæði heima í Føroyum og úti í heimi.

